FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Námsvísindadeildin

Tórshavn - Juli 2024

# VÆLKOMIN Á NÁMSVÍSINDADEILDINA (NÁD) Á FRÓÐSKAPARSETRINUM

Góði nýggi lesandi

Hjartaliga vælkomin á Námsvísindadeildina á Setrinum. Vit vænta og vóna, at tú fært nøkur góða, læruríк, kveikjandi og mennandi ár á Setrinum.

**Mánadag 19. august 2024 kl. 9.00-11.00**
**í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestrarabryggja 15)**

Byrjar lestrarárið við felags innleiðslu fyri øll lesandi á Fróðskaparsetrinum. Síðan verður farið í auluna á Frælsinum 21, har innleiðslan heldur fram Skráin fyri vikuna er á næstu síðu.

Vika 34 er innleiðsluvika, har tit partvís eru í Kongshøll og á Námsvísindadeildini, vanliga undirvísingin byrjar í viku 35, mánadagin 26. August.

Fríggjakvøld 25. august kl. 20.00 endar vikan við felags tiltakið í Reinsarínum og Perluni fyri øll lesandi og starvsfólk á Setrinum. Tiltakið verður kallað Seturssamanshow.

Tað er av stórum týdningi, at tú ert við til innleiðsluna, soleiðis at tú fært upplýsingarnar, sum tú hevur tørv á – um útbúgvingina og skeiðini, mannagongdir og reglugerðir, kunningar – og samskiftispallar, starvsfólk og lestrarvegleiðing osfr. Harafturat er innleiðslan eitt gott høvi til at heilsa uppá tey fólkini, sum tú fert at lesa saman við tey komandi árini. Tú fært eisini møguleikan at tosa við tey starvsfólk, sum kunnu royna at svara tínum spurningum um ymisk lestrarviðurskifti.

Vanliga undirvísingin byrjar í viku 35, og tykkara fyrstu skeið vera:

- Undirvísing og læring
- Føroyskt á grund
- Støddfrøði á grund

Tá undirvísingin byrjar, kunnar undirvísarin tykkum um innihald í skeiðinum og krøv til tykkum í sambandi við skeiðið, m.a. lærumál, arbeiðsbyrðu og prívtøku.

Vinaliga

Rúna í Skála, útbúgvingarleiðari fyri læraraútbúgvingina

Frida Poulsen, varadekanur á Námsvísindadeildini

Hans Harryson, varadekanur á Námsvísindadeildini

# Skrá fyri innleiðsluna á Násvísindadeildini 2024

**Mánadagin 19. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsunum, Vestarabryggja 15**

Tiltakið byrjar kl. 09.15, men tit skulu helst møta eitt sindur fyrr at heinta tykkara lestrarkort uttan fyri Kongshøll.

| | |
|---|---|
| kl. 09:00 | Skráseting |
| kl. 09:15 | Rektarin bjóðar vælkomin |
| kl. 09:25 | Lestrarskrivstovan bjóðar vælkomin |
| kl. 09:30 | Tónleikur |
| kl. 09:45 | Røða |
| kl. 10:00 – 11:00 | Básar á Svalanum |

*Lesandi fara út á deildirnar – Námsvísindadeildin er á Frælsið 20*

| | |
|---|---|
| kl. 11:30 | Kalpana Vijayavarathan, dekanur, bjóðar vælkomin og presenterar starvsfólk |
| | Felagsmynd verður tikin |
| kl 12:00 | Deildin bjóðar ábit |
| kl 12:45 | Útbúgvingarleiðarar greiða frá um útbúgvingarnar – *námsfrøði lesandi vera í auluni og læraralesandi fara í stovu 41* |
| kl 14:00 | Møtast í auluni til rundvísing á deildini |

**Týsdagin 20. august**

Kunnandi tiltak við ymiskum viðkomandi fyrilestrum verður í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestarabryggja 15) millum kl. 9-11. Endalig skrá kemur seinni.

**Mikudagin 21. august**

| | |
|---|---|
| kl. 09:00 | Skipað verður fyri innleiðsludegi á Námsvísindadeildini |

**Hósdagin 22. august**

frí

**Fríggjadagin 23. august**

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 -12.00 | KT-vegleiðing í auluni á Námsvísindadeildini (Frælsið 20) – Skipað verður fyri víðkaðari KT-kunning fyrrapartin av degnum, har tey lesandi fáa høvi at sita við telduni og fáa beinleiðis vegleiðing at rita inn í ymisku skipanirnar, sum verða brúktar í útbúgvingini. |
| Kl. 18.00 | Námsvísindadeildin bjóðar pizza og vit hugna okkum saman, áðrenn farið verður til SeturSamanShow |
| Kl. 20.00 | SeturSamanShow í Reinsarínum |